







# 3000 børn til jólaleik á Frælsinum

**Lesandi í 3. pedagogflokki á Læraraskúlanum fara í næstu viku fimtan ferðir at sýna jólaleikin, sum tey sjálvi eiga allan, sum hann er**

JÓLALEIKUR
*Eirikur Lindenskov*

Tað verður rættiligur jólahýrur í høllini á Læraraskúlanum í næstu viku. Tey í 3. pedagogflokkinum fara tríggjar ferðir hvønn dagin at spæla jólasjónleikin, sum tey hava arbeitt við seinastu vikurnar. Talan er um leik fyri 3-8 ára gomul.

Nú eru nakrar vikur síðani, at barnagarðar og skúlaflokkar upp til og við 2. flokki fingu tilboði um at síggja leikin. Tilboðið er alment, og eisini onnur enn tey í barnagørðum og skúlum hava tikið av tilboðnum.

Tað rúmast tvey hundrað í høllini til hvørja sýningina, og tað eru bara onkur hendinga pláss eftir til onkrar sýningar. Hvørjir møguleikarnir eru fæst at vita á 229636.

Tey pedagoglesandi eiga allan leikin, sum hann er. Fyrr í heyst fóru tey undir at skriva og yrkja leikritið, sum verður nevnt Loynilig jól, og sum snýr seg um børn og eina øðrvísi nissuverð. Seinastu tvær vikurnar hava tey saman við lærarum í handaligu lærugreinunum vant leikin, syrgt fyri búnum, pallmyndum, ljósi og øllum tí, sum hoyrir til ein sovornan leik.

Leikurin verður spældur kring alla høllina, og harvið fara børnini at uppliva tíman, sum leikurin gongur fyri seg, tættan, spennandi og hugnaligan.

Skúlar, barnagarðar og onnur kring alt landið hava keypt atgongumerki, og tí verða tað heilt víst nógvir blaðungir føroyingar á ferð til og úr høvuðsstaðnum og í Havnini í næstu viku.

Umframt at vera viðkomandi verkætlan í pedagogútbúgvingini so tænir leikurin sum fíggjarligt grundarlag undir lestrarferðini, sum pedagoglesandi sambært ásetingunum skulu fara uttanlands. 3. p fer hesa lestrarferðina fram ímóti sumri, tá ið tey hava verið í starvslæru ella praktikk.